## DAGSINS MEINING

### Tilfeingið má ikki koyrast í havið

– Í andsøgn við ætlanina um ein sjálvberandi búskap!

Júst tá nakrar keiputeknigar í Jútlandspostinum elvdu til mikið rok í øllum muslimska heiminum, varð spurningurin um tilfeingið í sjónum evnið í orðaskifti í føroysku fjølmiðlunum í fleiri dagar. Orsøkin er hon, at vit blaka útflutningsvirði fyri 20-tals milliónir krónur í havið aftur.

Spurningurin um at gagnnýta og góðska fiskin hevur ofta verið umrøddur. Ikki minst í hesum blað, har vit fyri meiri enn 25 árum síðani settu veruliga gongd á orðaskiftið um at góðska okkara fiskavørur meira, so vit skaptu fleiri arbeiðspláss og øktu útflutningsvirðið.

Hesuferð elvdi ein lýsing frá Kovanum um, at meira enn 20 milliónir krónur koma ikki landinum tilgóða, tí rognini verða koyrd í havið, og síðani ein evnisdagur um fiskalivur, sum fer sama veg.

Í samband við fiskalivrina hevur verkfrøðingurin Helgi Nolsøe, sum arbeiðir á hesum øki, upplýst, at um alt kemur til høldar, og um evnini úr livur verða framleidd fult út, er kanska talan um meira enn 100 mió.kr. í virði, sum ikki koma til sættis.

Ein orsøk til, at hvørki rogn ella livur kemur til landið, er hon, at kryvjimaskinurnar, sum nógv fiskiskip hava fingið sær tey seinastu árini, fer illa við innvølinum. Kryvjimaskinan hevur verið eitt stórt framstig og ein stórur lætti fyri fiskimenn. Harafturat sparir hon munandi um tíðina at hagreiða fiskin umborð og at fáa hann í ís. Tí fara teir, sum ein vísti á í lesarbrævi um dagarnar, ikki aftur til at kryvja við hond.

Men onkur onnur loysn má finnast. Fleiri uppskot eru nevnd. Ein er at bøta kryvjumaskinuna, og eisini er nevnt, at fiskurin bara verður bløðgaður og ikki kruvdur umborð. Somuleiðis hevur onkur víst á, at í rognatíðini kundu skipini havt eini tveir mans afturat við, tí so nógv fæst fyri rognini, at tað loysir seg at hava fleiri við.

Men hetta er ein spurningur, sum nógvar meiningar eru um, og sum vit ikki hava skil fyri. Hinvegin kunnu øll semjast um, at vit eiga og mugu fáa sum mest burtur úr okkara tilfeingi – á landi sum á sjógvi.

Tí mugu vit miða eftir, at tað politiskt verður lagt soleiðis til rættis, at alt skal koma til sættis. Flestu føroyingar eru samdir um, at vit skulu byggja upp ein sjálvberandi búskap, sum er fyritreytin fyri øllum sjálvstýri, men við hesum politiska setningi ber ikki til, at ókeypis tilfeingi fer aftur í havið. Tað hava vit kki ráð til!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvar er Anfinn Kallsberg

**SUNE JACOBSEN**
Sørvágur



**– Fyri at fáa fíggjarlógina í hús skeyt landsstýrið upp, at m. a. vektargjøldini fyri alt, sum rullar á vegunum, skuldi hækka. Undir viðgerðini á tingi hevði A.K. fostrað tað geniala hugskot, at tað skuldi verða ókeypis at ferðast um firðir og sund í framtíðini, skrivar Sune Jacobsen**

Gjørdi A.K. hetta fyri at yvirliva politiskt bæði á føroyskum og donskum tingi, ella arbeiðir hann í tí stilla við onkrum, sum vit ikki vita um?

**Meðan vit bíða**
Av tí at eg eri óvitandi um, hvat A.K. møguliga arbeiðir við, og tunnilin til Norðoyar verður tikin í nýtslu um stutta tíð, fari eg at heita inniliga á tykkum har norðuri um at virka fyri, at broytingar verða gjørdar í viðtøkunum fyri báðar undirsjóvartunlarnar. Saman kunnu tingfólkini í Norðoyggjum og Vágum gera hetta, bert viljin og hegni er til staðar.

**Alt klínt uppí**
Upprunaliga var ætlanin við Vágatunlinum, at landið skuldi fíggja ein part av íløguni, meðan brúkaragjaldið skuldi fíggja restina. Síðani er alt møguligt klínt upp í brúkaragjaldið. Fyri tað fyrsta var allur meirkostnaðurin av tunnilsgerðini smurdur upp á nýtslugjaldið. Tað verður hann eisini hjá tykkum har norðuri, um røttu viðkomandi ikki tala at, og gera nakað munagott. Fyri tað næsta er landsvegalógin sett úr gildi fyri tunlarnar báðar.

**Eingin landsvegalóg galdandi**
Korir tú vestur í Vágar, skal tú gjalda fyri íløguna av 300 m. av vegi og brúnni fram til tunnilsmunnan Streymoyarmegin. Koyrir tú hinvegin eftir sama strekki til Kvívíkar ella Vestmanna, skalt tú einki gjalda.. Og ikki nóg mikið við tí. Tú skalt gjalda fyri viðlíkahald,asfaltering og kavarudding líka til tunnilin einaferð er goldin.

Inni í tunlinum skalt tú umframt tað, sum áður er nevnt, gjalda fyri ljósið undir loftinum, og út aftur komin Vágamegin skalt tú gjalda fyri íløguna,viðlíkaha ld,asfalterin og kavarudding av 2 km. av vegi til tunnilin er goldin.

**Hvussu ber tað til**
Um tað var av gáloysni ella við beráddum huga, skal eg ikki gita um, men tað er ein sannroynd, at tá viðtøkurnar fyri Vágatunnilin og Norðoyatunnilin vóru samtyktar á tingi,stóð, at vegir, brýr og tunlar verða "ikki" partar av landsvegnum (løgtingslóg nr.51 frá 25.juli 1972 um landsvegir) Hetta er ótrúligt. Alt landsvegakervið, tað veri seg el-steyrar,asfalterin og kavarudding er umfatað av landsvegalógini, men ikki Vágatunnilin og Norðoyatunnilin.

**Hvørja ávirkan hevur tunnilin havt.**
Fyri nøkrum døgum síðani var ein temadagur í Vágum, har nøkur útvald vórðu boðin at viðgera, hvørja ávirkan tunnilin hevði havt fyri økið. Seinni um dagin var almennur fundur í bygdarskúlanum í Miðvági, har sama evni var til umrøðu.

Stutt kann sigast, at meðan fólkavøksturin í Føroyum frá 2002-2005 hevur verið 1%, er hann yvir 4% í Vágum .

**Hvat kundi verið øðrvísi**
Tað, sum eg fegnaðist mest yvir,var,at 20% av teimum, sum koyra um sundið hava fast hald. Tað vil siga, at hetta eru í høvuðsheitum fólk, sum búgva í Vágum, og arbeiða aðrastaðni. Vit vita eisini, at fleiri familjur, sum hava verið uttanlands í lestrarørindum, hava búsett seg í Vágum, sjálvt um tey arbeiða í Havnini.

Fyri at styrkja um hetta, at fólk, sum arbeiða aðrastaðni, búseta seg í ávikavist Vágum ella Norðoyggjum, hevði tað verið ómetaliga skilagott at sett fasta mánaðargjaldið frá 1000kr. niður í 500kr., og hetta hevði neyvan kostað tunlinum eitt oyra, tí sum er, koyra í fleiri førum fleiri í sama bili, og tað er ikki ein nøktandi varandi loysn.

**Áheitan**
Tí skal mín áheitan til tykkum har norðuri verða:

*Arbeiði fyri at løgtingslóg nr. 51 frá 25.juli 1972 um landsvegir verður sett í gildi fyri tunlarnar báðar.*

*At mánaðarliga gjaldið verður sett úr 1000 kr. niður í 500 kr.*

*At umsitingin av tunlunum, sum nú húsast á Skansavegi 7 í Tórshavn, antin verður flutt í Norðoyggjar ella í Vágar.*

Hetta hevði verið eitt risastig á leiðini, meðan vit bíða eftir endaligu loysnini hjá Anfinn Kallsberg.

*sune@post.olivant.fo*

# Hvar eru bandupptøkurnar, Høgni Hoydal?

**JOHAN DAHL**
Løgtingsmaður



**– Bíðað verður í tolni eftir svarinum frá Høgna viðv. Frank Jensen bandupptøkkuni – hvat bleiv av teimum, spyr Johan Dahl, løgtingsmaður**

Undirritaði spurdi fyri vikum síðan formann Tjóðveldisfloksins, um hann ikki kundi greiða okkum minni vitandi frá, hvat var blivið av famøsu bandupptøkuni frá fullveldissamráðingunum á sinni – men tað er stilt sum í grøvini frá tjóðveldisformanninum.

Hevur kanska ikki tíð at spyrja teir, sum vóru við honum til fundin og framdu hesa tápuligu gerð, hvar bandið/bondini blivu av, nú nógv er at gera hjá flokkinum við ST fráboðanir og endaligum staðfestinugm av ómissandi sjálvsavgerðarrætti okkara í altjóðarættinum.

Høgni tú skyldar okkum eitt svar.

Ella skulu vit ganga út frá, sum orðatakið sigur, at tann sum tigur hann samtykkir, og at tú so hervið er samdur við okkum ivasomu í, at tær ivaleyst liggja fjaldar í onkrum skýmaskoti til seinni »søguligt« brúk.

Livst so spyrst.

*faromar@post.olivant.fo*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.